**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 0828**
**Tíðarskeið 15/05-20/05-2008**

---

**Fólk frá FRS.:** Bogi Hansen og Regin Kristiansen.
Marie-Jose Messias (frá AQUALAB í Bretlandi).
**Ábyrgd:** Bogi Hansen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir teimum fýra standardskurðunum. Vit skuldu eisini taka fortoyningar upp á teimum føstu støðunum.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, WP2-glúpur og útgerð at taka fortoyningar upp við.

**Um túrin:** Vit fóru út hóskvøldið 15/5 kl.2100. Siglt varð suður til NWSC, sum varð tikin upp, tá tað var vorðið ljóst. So var hildið fram við NWSB, sum varð tikin upp í øllum góðum.
Vit fóru nú vestur í Bankarennuna, har vit fyrst settu eina rammu út á NWFG. Vit tóku so tvær ADCP-ir upp ávikavist NWFB og NWFC, vit tóku eisini AQUALAB upp. Hetta gekk alt sum tað skuldi.
Vit tóku nú skurð V av Bankanum og inneftir. Tá skurðurin var tikin sigldu vit norður til skurð N, har vit tóku allar mátararnar upp NWNA, NWNE, NWNB og NWNG. Alt gekk uttan trupulleikar uttan NWNE, har var einki samband í fyrstu syftu, men seinni svaraði hon og kom upp í øllum góðum.
Frá skurði N sigldu vit vestur á Íslandsryggin at dreggja eftir eini rammu, ið ikki kom upp í 2006. Vit dreggjaðu í 12 tímar uttan úrslit. Vit høvdu samband við rammuna, men hon kom ikki upp.
Á veg inn tóku vit ein skurð við thermistorketuni inn móti Mykinesi.
Tá hetta var liðugt, varð siglt á Havnina.
Vit vóru aftur á Havnini týsdagin 20/5 kl. 0450.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 15 støðir og saltprøvar á øllum. Við WP2-glúpinum tóku vit eisini 15 støðir.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða lisnir í heyst.

**Viðmerkingar:**

16-09-2008 ____________________________
Regin Kristiansen

Vend




Støðir og kósir á túri 0828